

# Atlantic Petroleum eftir 200 mill. kr á børsinum

**Jan Müller**

27.11.2013 - 09:07

Oljan.fo

Føroyska oljufelagið Atlantic Petroleum, sum hevur sett út í kortið eina heilt nýggja og spennandi kós við at skráseta seg á norska virðisbrævamarknaðinum í Oslo, hevur í dag lagt fram eitt prospekt, verkætlan, har útvegast skulu 200 mill. kr. skrivar Ritzau Finans.

Talan verður um at luta út 1,58 mill. nýggj partabrøv, sum liggja í eini príslegu úr 140 upp í 160 norskar kr. Felagið skal fáa til vega 150 til 200 mill. kr. í sambandi við børsskrásetingina.

Endamálið við kapitalútveganini og at fara á norska virðisbrævamarknaðin er at vaksa um ognirnar hjá felagnum á norska landgrunninum. Mett verður um fleiri nýggjar verktætlanir, og Atlantic Petroleum væntar, at ein ella fleiri av hesum kunnu verða lidnar í 2014.

Atlantic Petroleum roknar við, at tað finnast fleiri góð leitiøki og møguleikar á norska landgrunninum, og eftir at felagið hevur keypt norska Emergy Exploration, heldur

leiðslan, at felagið er búgvið og væl fyri at víðka um sítt virksemi í Norra. Alt hetta er sjálvandi treytað av komandi kapitaløkingini